Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Sp/f Handilsvirkið Niclasen, Sørvágur:

# 140 ára føðingardagur




*Handilsvirkið Niclasen heldur í dag til úti á Bakka í Sørvági*

**29. desember 1864 kom handilsloyvið á fysta sinni í Norðstovu í Sørvági og hevur Niclasen familjan síðan fingist við handil og mangt annað vinnuvirksemi. Í dag, 140 ár seinni, handlar familjan enn, og er tað 6. ættarlið sum roynir seg**

## FYRITØKA

Í 1956 var einahandilin avtikin í Føroyum, tá sluppu føroyingar sjálvir at hava handil. Sama ár byrjaði Jóhan Mortensen handil sín á Tvøroyri. Jóhan var virkin maður, og í árunum eftir komu fleiri úthandlar kring landið. Ein av hesum úthandlum kom at vera í bóndahúsunum hjá Niclas Samuelsen í Sørvági, nevnd Norðstova.

Hesin úthandil varð stovnaður í 1864, og handlaði mest við matvørum, byggitilfari og ymiskum neyðsynjarvørum at byrja við. Niclas fekk fyrsta handilsloyvi í familjuni tann 29. desember 1864.

Hesin Niclas Samuelsen var um tað mundið komin til árs, og longu í 1872 tók við sonur hansara, Dánjal Niclasen (Ríki-Dánjal), ið tá var 31 ára gamal, við. Niclas doyði í 1896.

Avtalan var tá, at úthandilin skuldi selja vørur fyri Mortensen, og haraftrat turkaðu teir eisini fisk, ið sluppirnar hjá Mortensen komu við.

Dánjal helt á til ár 1900, tá hansara dagar vóru taldir og árarnar lagdar inn. Tá tók sonurin Niclas Niclasen við. Samstarvið við Mortensen helt fram til eftir fyrsta veraldarbardaga, tá Handilsvirkið Niclasen byrjaði at innflyta sjálvir.

### Posthús í Norðstovu

Eftir aldarskifti gjørdist virksemið hjá fyritøkuni størri og størri.

Posthúsið hevði fyritøkan eisini. Í 1916 kom posthús eisini í Norðstovu. Postflutningurin til Bíggjars, Gásadals og Mykinesar var eisini røkt av felagnum. Niclas hevði posthúsið til 1939, tá dótturin Sigrid Olsen (vanliga nevnd Sigrid á posthúsinum) tók við. Hon røkti starvið til 1988.

Í 30-unum kom eisini garvarí í fyritøkuna. Tað var Edward, sonur Niclas, ið hevði verið uttanlanda og lært seg kynstrið at garva.

### Fiskifør í fyritøkuna

Sum fiskaframleiðari var umráðandi at hava rávørugrundarlag, og valdi fyritøkan tí at ogna sær fiskifør. Frá 1905 og fram til 1925 keypti fyritøkan sjey smærri 6-10 tons dekksbátar, og fiskurin varð virkaður í Sørvági.

Hildið var fram við hesum fiskiskapi til fyrst í 30-árunum, tá felagið byrjaði at keypa sluppir. Fyrsta var »Syv Søstre«, sum var keypt 23. januar 1930. Hon fekk tó eina stutta livitíð, tí longu í juli sama ár rendi hon á eina fles í Grønlandi og sakk. Síðani var »Skarphjeðinn« keypt tann 19. desember í 1930, helst fyri »Syv Søstre«. Í 1934 keyptu teir so »Haffarið« og í 1936 kom so eisini »Eysturoyggin« í felagið. »Eysturoyggin« var skipið, har kaptajn Mikkelsen úr Søvági, sum fyrsta skip nakrantið í 1940 flaggaði við føroyska merkinum. Reiðaríðið var Niclasen í Sørvági.

Hesar sluppir hildu fram við fiskiskapinum, og í 1939 varð »Vesturvarði«, sum fyrsti trolarin hjá felagnum, keyptur.

Í 1939 var eisini Vága Trolarafelag stovnað. Og var Niclasen ein av høvuðsánarunum. Vága Trolarafelag varð so við og við uppkeypt av felagnum í Sørvági, til tað at enda í 1961 heilt var á teirra hondum.

Í 1939 var ikki bert árið, tá felagið fekk sín fyrsta trolara. Hetta árið varð eisini eitt nýtt og eftir tátíðarmynstri sera framkomið turkihús bygt. Hetta hevði tá sera stóran týdning fyri virkið, sum umframt vanliga handilin, hevði fiskivinnu sum høvuðstátt. Hetta árið doyði Niclas, og sonurin Dánjal Niclasen tók við sum stjóri í fyritøkuni.

Meðan seinni heimsbardagi herjaði, varð einki nýtt skip keypt, men so skjótt hesin var av, komu eisini nýggj skip til felagið. Beint eftir kríggi komu teir tríggir snurruvoddarnir »Vesturleið«, »Vestursøki« og »Vesturleiki«, og í 1947 kom »Vesturskin«, ið var trolari.

### Um Vágafjørð og Mykinesfjørð

Flestu av hesum skipum gjørdust tó ikki gomul í fyritøkuni, og í 1949 vóru tveir av snurruvodsbátunum seldir til Noregs, og árið eftir fór eisini hin triði úr fiskiflotanum. Hetta var »Vesturleið«, og hann skuldi ikki verið heilt ókendur fyri tey, ið eru komin eitt sindur til árs. Felagið setti bátin inn í ferðafólka- og farmasigling millum Miðvág og Havnina, og mong munnu tey vera, ið minnast onkran baldrutan túrin um Vágafjørð við »Vesturleið«. Í 1970 var »Vesturleið« seldur til Klaksvíkar.

Handilsvirkið Niclasen hevði eisini siglingina til Mykinesar. Hesa sigling hevði felagið um hendi líka til 1969, tá tað almenna helt seg verða betur til at reka millumoyggja sigling og yvirtók hesa eins og allar aðrar privatar leiðir í Føroyum.

### Fyrsta flakavirki í landinum

»Vesturvarði«, ið kom í 1939, varð seldur aftur í 1949, og »Vesturskin« varð seldur í 1953. Samstundis helt eisini trolvirkið, ið



*Arbeiðsfólk uttan fyri fiskahúsið hjá Norðstovuhandlinum*



*Trolarin Vesturskin var keyptur í 1947 eftir at trolarin Vesturvarið hevði vunnið felagnum væl undir krígnum*